# EIN LOPFJØL MÓ
# POPPTIN



**Tað hoyrist á fløguni Let Your Scars Dance, at Lena og Niclas eru ment á nærum øllum økjum síðan síðstu útgávuna Can't Erase It. Nógvu konsertirnar og miðvísa arbeiða hjá fremstu føroysku tónleikahjúnunum hoyrist aftur á hesari fráliku útgávu, ið er nógv tað besta, ið nakar av teimum hevur latið úr hondum.**

**UMMÆLIÐ**
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Fløgan Let Your Scars Dance hjá Lenu Andersen rakti meg beint í hjart, longu fyrstu ferð eg hoyrdi fyrstu tónarnar av fyrsta lagnum á fløguni, Lenu, ið uttan fylgispæl syngur orðini:

> Lay down all your worries
> Lay them down at your feet
> Soon you will be dancing
> To rhytm of your own heartbeat

Alt meðan ljóðið av hjartaslátti spakuliga byrjaði at buka í oyrum mínum. Eg var seldur beinanvegin. Hóast eg ikki dansaði, so dansaði hjarta í bringuni. Hetta var so øgiliga nógv betur enn nakað, ið Lena ella Niclas høvdu latið úr hondum áður. Menningin, ið tey bæði eru farin í gjøgnum, sum tónleikarar, sangskrivarar, tekstskrivarar og kanska eisini sum menniskju, hoyrdist aftur í hesum 10 løgunum.

### Svartskygni gjørt til skammar

Fløgan hevur ligið í fløguspælaranum leingi nú, og mær dámar hana akkurát líka væl, ella um rætt skal vera rætt uppaftur betur. Hetta er ein gjøgnumførd tónleikaframleiðsla: væl skrivaði løg, fínir tekstir, væl sungið, væl spælt og oman á alt, so er tað eisini væl framleitt og ljóðblandað. Samstarvið millum Lenu, Niclas og Óla Poulsen hevur á báðum fyrru fløgunum hjá Lenu verið dømi um, hvussu galið tað kann ganga, tá fremsti føroyski ljóðblandarin fær fríar teymar við popprokki. Úrslitið; tvær alt ov poleraðar fløgur, ið als ikki gjørdu Lenu ella hennara sangum nakra tænastu. Tí var eg sera svartskygdur, tá eg frætti, at Lena og Niclas høvdu avbrotið samstarvið við Red Hot Chili Peppers blandaran Ryan Hewitt og vóru farin aftur til Óla Poulsen. Men eg skal viðganga, at tey hava gjørt mínum svartskygni til skammar.

### Kínt fyri staklutunum

Fløgan ljóðar organisk og livandi, og endiliga sleppur man at uppliva dýpdina, ið løgini og røddin hjá Lenu hava á konsertum, endurskapta á fløgu. Ikki tí, fløgan ljóðar ikki, sum Lena live. Her er kínt fyri staklutunum og arbeitt nógv við at fáa teir at fella inn í ljóðmyndina uttan at hvørva, og tað er kanska júst hetta, sum ger munin á hesi útgávuni og teimum fyrru: Hesaferð er kínt fyri staklutunum, teir eru ikki bara pussaðir við sandpappíri niður til okkurt blankt og slætt.

### Poppkendur rokkur

Tað ljóðaði, at orsøkin, at samstarvið við Ryan Hewitt varð slept, var, at hann og hjúnini ikki høvdu somu tilgongd til løgini, og at hansara ljóðbland kanska var meira rokkkent enn tað, sum tey ynsktu. Hetta verður í ein ávísan mun váttað á lagnum Who Am I, ið er einasta ljóðblandið hjá Hewitt, ið er komið við á fløguna. Hetta ljóðbland brýtur nógv frá hinum løgunum. Tað rokkar og er í mínari metan sera væleydnað.